# INNIHALD

**Útgangsstøðið** ........................................................................ 2

**1. Arbeiðssetningur** ...................................................................... 2
1.2. Arbeiðið hjá bólkinum ................................................................ 3

**2. Samandráttur av tilmælinum frá arbeiðsbólkinum** .................... 3

**3. Stevnumið** ............................................................................... 4
3.1. Endamál fyri útbúgvingina.......................................................... 4

**4. Meting av virkjum, sum kunnu lúka treytirnar** ........................ 6
4.1. Hvørjar treytir eiga at verða settar virkjum ................................ 7
Hvat slag av virkjum talan er um ................................................ 8
Tal av virkjum, sum mett verður lúka treytirnar ........................ 8
Tal av lærlingum ......................................................................... 8

**5. Skipan av útbúgvingini** ............................................................. 9
5.1. Býtið millum verkliga læru og skúlagongd ................................ 9

**6. Ymisk viðurskifti í sambandi við skúlagongdina** ....................... 12
6.1. Broytingar í verandi lógum og kunngerðum ................................ 12
6.2. Skúlagongd í Føroyum ella uttanlands ........................................ 12
6.3. Kostnaður ..................................................................................... 13

**7. Niðurstøða arbeiðsbólksins** ....................................................... 14

**Fylgiskjøl**
- Føroyakort yvir ali-, smolt-, lívfiskastøðir og onnur fiskasløg ........ 15
- Føroyakort yvir fiska-, kryvji-, royki- og laksavirki ....................... 16

## Útgangsstøðið

Føroya Ráfiskakeyparafelag og Føroya Havbúnaðarfelag heittu í brævi dagfest 8. juni 2000 á Yrkisútbúgvingarráðið um at seta á stovn lærlingaútbúgving innan fiskaídnað og havbúnað. Ynskið hjá feløgunum var, at fiskavirki og alistøðir í framtíðini skulu hava møguleika fyri at hava lærlingar í læru á líknandi hátt, sum innan handverks- og skrivstovuøkið. Yrkisútbúgvingarráðið tók áheitanina til eftirtektar og setti ein arbeiðsbólk at gera uppskot um yrkisútbúgving innan fiskaídnaðin og havbúnaðin.

Í arbeiðsbólkinum hava sitið:
Marita Rasmussen, Føroya Ráfiskakeyparafelag,
Bogi Jacobsen, Føroya Havbúnaðarfelag,
Jákup Andreasen, Fiskivinnuskúlin,
Petur Oluf Hansen, Ráðsfyrisitingin, og
Hans A. Dam Joensen, Mentamálastýrið.

## 1. Arbeiðssetningur

Arbeiðsetningurin hjá arbeiðsbólkinum, ið Yrkisútbúgvingarráðið hevur sett, er soljóðandi:

1) At gera eitt yvirskipað endamál fyri útbúgvingina, her í millum fyri
- tey fakligu málini,
- tey almennu málini,
- tey persónligu málini, og
- møguleikarnar fyri framhaldandi útbúgving.

2) At gera eina meting um virki, sum kunnu lúka treytirnar fyri málunum í pkt.1), herundir

- hvørjar treytir skulu setast virkjunum,
- hvat slag av virkjum talan er um,
- tal av virkjum, sum mett verður lúka treytirnar, og
- hvussu nógv læripláss talan kann verða um.

3) At gera eina meting um, hvussu útbúgvingini skal skipast, herundir
- býtið millum verkligu læruna og skúlagongdina.

4) At gera eina meting um, hvussu skúlagongdin kann skipast, herundir
- um verandi lógir og kunngerðir innan yrkisútbúgvingar í Føroyum mugu broytast, og um til ber at taka skúlagongdina í Føroyum,
- um møguleikarnar fyri skúlagongd uttanlands, um so er, at hon ikki verður tikin í Føroyum,
- um útbúgvingin kann verða góðkend í øðrum londum, og
- um fíggjarligu avleiðingarnar av at seta útbúgvingina á stovn.

### 1.2 Arbeiðið hjá bólkinum

Arbeiðsbólkurin hevur havt 7 fundir. Fyrsti fundur var hildin 19. oktober 2000. Arbeiðið hevur gingið væl og limirnir í bólkinum eru samdir um tey tilmæli, sum koma fram í hesum áliti til Yrkisútbúgvingarráðið.

Fyri at kanna tørvin á lærlingum hevur arbeiðsbólkurin gjørt eitt spurnarblað, sum sent varð út til flaka- og kryvjivirkini, eins og til smolt- og alistøðirnar kring landið. Annars hevur arbeiðsbólkurin gjørt brúk av teimum førleikum, sum Fiskivinnuskúlin, Ráðsfyrisitingin og Mentamálastýrið hava á økinum, umframt at vinnuumboðini hava brúkt nevndirnar í avvarðandi vinnufeløgunum at tryggja sær, at tilmælið hjá arbeiðsbólkinum í størst møguligan mun hevur undirtøku í vinnuni.

## 2. Samandráttur av tilmælinum frá arbeiðsbólkinum

Arbeiðsbólkurin mælir til, at:

1. útbúgving innan fiskaídnað og havbúnað verður sett á stovn í Føroyum sum ein 3-ára yrkisútbúgving,
2. útbúgvingin verður skipað við tveimum breytum - einari til lærlingar á flaka- og kryvjivirkjum (”fiskavirkari”) og einari til lærlingar á smolt- og alistøðum (”fiskarøktari”),
3. skúlagongdin í útbúgvingini fer fram á Fiskivinnuskúlanum, sum frammanundan hevur fiskivinnuútbúgvingar, og sum lærlingaútbúgvingin partvíst kann samskipast við,
4. fyrsta árið í útbúgvingini er eitt støðisár. Annað árið er upplæring á læruplássinum. Triðja árið er partvís upplæring á læruplássinum, og partvís skúlagongd í 12 vikur, har yrkisroyndin fer fram. Hesar 12 vikurnar kunnu býtast í 2 styttri skúlaskeið,
5. viðkomandi yrkisnevnd samtykkir innihaldið í yrkislærugreinunum og fakligu grundlærugreinunum, og hvørjar hesar skulu vera. Skúlin ger í samráð við yrkisnevndina av, hvørjar tær almennu grundlærugreinirnar á C-stigi skulu vera,
6. útbúgvingin verður skipað soleiðis, at lærlingarnir eisini fáa lestrarførleika til víðari/framhaldandi útbúgvingar,
7. fólk, sum hava verið í vinnu innan fiskaídnað og havbúnað, kunnu fáa stytting í lærutíðini,
8. krøv verða sett læruplássunum, soleiðis at lærlingum verður tryggjað eina læru, sum gevur góðar førleikar til at kunna taka ábyrgd av einum virkisøki á virkjunum,
9. seta arbeiðsbólk við umboðum fyri vinnu, skúla og avvarðandi myndugleikum at útgreina innihaldið í útbúgvingunum, t.v.s. at tilevna eina útbúgvingarkunngerð, og at
10. skipanin verður sett í verk 1. januar 2002.

# 3. Stevnumið

Vinnufeløgini í fiskaídnaðinum og alivinnuni hava víst á tørvin hjá virkjum, at fáa møguleikan til at seta lærlingar á líknandi hátt, sum gjørt verður t.d. innan handverk og á handils- og skrivstøvuøkinum. Hetta er gjørt ásannandi, at virkini hava tørv á fólki til ábyrgdarstørv, sum hava ávísan ástøðiligan førleika, umframt at hava verkligar førleikar, sum tey kunnu læra á virkjunum.

Kappingin um dugnalig starvsfólk er alsamt økjandi og gongdin er sum heild tann, at meginparturin av ungdóminum fær sær eina útbúgving. Vinnufeløgini hava ta áskoðan, at kunnu virkini bjóða komandi og verandi arbeiðsfólki sínum møguleikan fyri at taka útbúgving, vil hetta betra um kappingarføri teirra eftir dugnaligum arbeiðsfólki.

Arbeiðsbólkurin metir, at vit her hava ein sera góðan møguleika at skipa útbúgvingarnar soleiðis, at tær hóska til føroyskar umstøður.

Arbeiðsbólkurin skal sambært arbeiðssetninginum gera sítt tilmæli til Yrkisútbúgvingarráðið um at skipa útbúgvingar innan fiskaídnað og havbúnað sum yrkis-/lærlingaútbúgving. Tá hetta arbeiðið nú er gjørt, og um ráðið tekur tilmælið til eftirtektar, verður mælt til at seta nýggjan arbeiðsbólk, sambært uppriti til Yrkisútbúgvingarráðið dagfest 28. august 2000, við limum við serligum fakligum førleikum. Hesin arbeiðsbólkur kemur at gera eitt meira nágreinligt uppskot um innihaldið í útbúgvingunum.

## 3.1 Endamál fyri útbúgvingina

Tað er sambært yrkisútbúgvingarlógini frá 1998 umráðandi fyri eina og hvørja yrkisútbúgving, at hon bæði setir sær mál fyri einstaka lærlingin, og nøktar tann tørv, ið vinnan hevur. Tey endamál, ið verða sett fyri lærlingin, kunnu býtast í 3 tættir: faklig, almenn og persónlig.

Tað er eyðsæð, at **fakligu málini** hjá lærlinginum mugu setast í mun til tað arbeiði, sum vinnan býður seg fram við í hesum árum. Talan er um arbeiðspláss, sum mennast skjótt og krevja munandi tillaging í arbeiðsgongdini, umframt áhuga fyri at ganga nýggjar leiðir. Væntast kann, at nýggj tøkni verður ein avgerðandi partur av arbeiðsgongdini, og tí verður møguliga minni talan um vanligt handverk, enn at duga at hava eftirlit við tólum, og hvussu tey kunnu gagnnýtast sum frægast. Líta vit at arbeiðsøkinum hjá grannum okkara, hava teir ásannað, at nýggja tøknin krevur eina alt breiðari vitan hjá starvsfólkinum. Hetta eiga komandi yrkisnevndir at hava í huga, tá ið innihaldið í útbúgvingini skal ásetast.

Eisini má havast í huga, at ein útbúgving eigur at geva so mikið breiðan førleika, at viðkomandi eisini við **almennu og persónligu málunum** kann nýta sína vitan í samfelagsligum høpi, soleiðis sum almennandi parturin eisini leggur upp til.

Tað er av stórum týdningi, at útbúgvingin ikki er avmarkandi til eitt smalt fakøki, men at hon eisini kann gerast støði undir framhaldandi útbúgving, um hugur og evni eru til tess. Sum heild má metast, at einhvør útbúgving má eggja fólki til støðugt at dagføra sín førleika, ikki minst við at skoyta uppí upprunaligu útbúgvingina.

Í hvussu stóran mun hetta fer at gera seg galdandi innan fiskaídnaðin og alivinnuna, kann verða eitt sindur ringt at meta um, men sum partur av nútíðar vitanarsamfelagnum, fara starvsfólkini óivað at seta somu krøv um eftirútbúgving og skeið sum innan aðrar vinnur. Við hesum fáa vit eisini betri møguleikar fyri framflyting hjá starvsfólkinum, bæði tá ið tað snýr seg um ábyrgd og um løn. Júst vantandi framflytingarmøguleikar kunnu metast sum ein partur av trupulleikunum hjá vinnuni at fáa fatur á ungum starvsfólki – og varðveita tey í vinnuni.

Eisini kann væntast, at breiðir og almennir førleikar hjá starvsfólki fara at bøta um flytførið hjá arbeiðsorkuni frá einum arbeiðsplássi til eitt annað.

Hetta skapar eitt gott grundarlag fyri vøkstri hjá einum livandi vinnulívi, eins og tað er í tráð við tey ynski, sum starvsfólk gera galdandi í dag. Tað er ikki nóg mikið, at avmarka útbúgvingarmøguleikarnar í vinnuni til hægri útbúgvingar. Eisini útbúgvingartørvurin hjá teimum, sum enn arbeiða sum ófaklærd, eigur at verða gingin á møti.

Arbeiðsbólkurin metir, at innihaldið í teimum fyrstu 40 vikunum av skúlapartinum er á so mikið breiðum støði, at hann væl og virðiliga livir upp til endamálini, sum eru umrødd frammanfyri. Við hesum grundarlagi er lætt at byggja omaná, um ynski er um tað, samstundis sum lærlingarnir gerast ein javnbjóðis partur í eini longu gróðursettari føroyskari fiskivinnuútbúgving. Her verður sipað til tær almennu grundlærugreinirnar á C-stigi í føroyskum, enskum, støddfrøði, alis-/evnafrøði, lívfrøði og samfelagsfrøði. Afturat hesum koma so yrkislærugreinirnar og tær fakligu grundlærugreinirnar innan fiskaídnað og aling, alt eftir, hvørjum læruplássi, viðkomandi kemur frá. Sum dømi um slíkar yrkislærugreinir og fakligar grundlærugreinir, ið verða lisnar yvir eitt styttri tíðarskeið, kunnu nevnast:

- Almenn skeið fyri alarar á sjónum
- Almenn skeið fyri smoltalarar
- Arbeiðsgongdin í fiskiídnaðinum
- Arbeiðsstøður og ergonomi
- Automatisering og úrtøka
- Flutningur av livandi fiski
- Fóður og fóðurstýring
- Framleiðslureinføri
- Framleiðslureinføri/reingerð
- Fyriskipan (organisatión)
- Fyrstahjálp
- Góðskukrøv hjá ymiskum marknaðum
- Góðskutilvit og –hugburður
- Hagreiðingarskipanir

- Haldgóðska hjá fiski/alifiski
- Innaneftirlit, HACCP og ISO skipanir
- Krøv til hagreiðing av alifiski
- Kunda- og myndugleikakrøv
- Kunnleiki til hondskering
- Lóggáva á fiskivinnuøkinum
- Serskeið í ljósstýring
- Serskeið í endurnýtslu av vatni
- Rávøru- og goymslustýring
- Reingerðarskeið
- Sjúkur og sjúkufyribyrging
- Skipað góðskubetringararbeiði
- Smáverur og reinføri/sóttreinsing
- Starvsfólkamenning
- Stýring av umhvørvi (skipanir)
- Teldutøkni
- Tilvitan/stýring av arbeiðsumhvørvi
- Trivnaður á arbeiðsplássinum
- Trygdarskeið
- Tøknilig skeið
- Umhvørvistilvit og –hugburður
- Vatngóðska
- Vørugóðska
- Vørumenning

Hesar yrkislærugreinir og fakligar grundlærugreinir, ið verða lisnar sum stutt skeið, ber til at samskipa við stakskeið fyri onnur starvsfólk í vinnuni, og kunnu tí gerast týðandi táttur í førleikamenningini í føroyska fiskaídnaðinum og alivinnuni sum heild.

## 4. Meting av virkjum, sum kunnu lúka treytirnar

Í føroyska fiskaídnaðinum eru virkini sera ymisk í stødd, umsetningi og í virkisøki. Arbeiðsbólkurin metir, at hóskandi er at býta virkini sundur í tríggjar bólkar við hesum felagseyðkennum:

- Smá virki við avmarkaðum virkisøki og lítlum virksemi. Í ávísum førum arbeiða heilt fá fólk á virkjunum partar av árinum. Arbeiðsbólkurin metir, at hesi virki eru neyvan egnað at taka lærling.
- Størri virki, sum hava eina framleiðslu, ið er einsháttað (kryvjivirki, saltfiskavirki), men hava javnt virksemi árið runt. Arbeiðsbólkurin metir, at hesi virki kunnu taka lærling, um tey lúka formligu krøvini annars, allarhelst í felag við annað virki fyri at tryggja, at lærlingurin fær eina fjøltáttaða læru.
- Stór virki, ið hava eitt fjøltáttað virksemi við fleiri framleiðslulinjum, søluliði e.l., sum hava virksemi árið runt. Hesi virki kunnu taka lærling við at lúka formligu krøvini.

Smolt- og alistøðirnar eru flest allar egnaðar at taka lærling, um tær annars kunnu lúka formligu krøvini til útbúgvingina. Onkrar smoltstøðir eru tó ikki fult útbygdar enn, og mælt verður tí til, at hesar í fyrsta umfari ikki kunnu taka lærling.

## 4.1 Hvørjar treytir eiga at verða settar virkjum, sum ætla at seta lærling

Tað er greitt, at treytir mugu setast virkjunum, sum ætla at seta lærling. Hesi krøvini eiga at líkjast teimum krøvum, ið verða sett til virki, t.d. innan handverks- og handils-/skrivstovuøkið.

Annars kunnu krøv setast um, at:

- Virkini skulu gera eina ætlan fyri upplæringini av lærlinginum soleiðis, at honum/henni verður tryggjað eina fjølbroytta læru. Er virkisøkið hjá viðkomandi virki avmarkað, má umsøkjari vísa á annað virki, har lærlingurin kann fáa upplæring ein part av tíðini.
- Virkini skulu kunna tryggja lærlinginum eina læru, sum gevur góðar førleikar til at kunna taka ábyrgd av einum virkisøki á virkjunum. Hetta kann verða at taka sær av at leiða og býta arbeiðið á eini skeri- ella pakkideild, umframt at kunnu halda skil á teimum leiðsluamboðum, sum vanliga verða brúkt fyri at stýra framleiðsluni á deildini. Tað merkir eisini at virkini, sum taka lærlingar, mugu nýta slík stýringsamboð.

Av tí, at tað ikki áður hevur borið til at taka slíkar útbúgvingar í Føroyum ella aðrastaðni, eru ikki yrkislærd fólk, sum uttan víðari kunnu taka ábyrgdina av læruni hjá lærlingunum á sama hátt, sum gjørt verður í øðrum lærlingaútbúgvingum. Hetta verður ein av avbjóðingunum hjá komandi yrkisnevndum fyri fiskaídnaðin og havbúnaðin, sum óivað mugu gera metingar í hvørjum einstøkum føri, um virkini hava førleika at taka sær av upplæringini.

Arbeiðsbólkurin metir tó, at persónar, sum hava hægri útbúgving, tekniska útbúgving, útbúgving frá Fiskivinnuskúlanum ella onnur, sum hava drúgvar arbeiðsroyndir í vinnuni, kunnu taka ábyrgdina av, at lærlingurin fær ta læru, hann skal hava sambært eini útbúgvingarætlan.

Arbeiðsbólkurin metir, at viðkomandi yrkisnevnd fyrstu tíðina skipanin virkar, má meta um hvørt einstakt virki, sum søkir um góðkenning sum læurupláss og út frá omanfyri nevndu fyrilitum taka støðu til góðkenningina.

Arbeiðsbólkurin hevur eisini viðgjørt, hvussu sleppast kann undan, at lærlingur bara er førur fyri at røkja nakrar fáar arbeiðsuppgávur eftir lokna útbúgvingin. Her verður skotið upp, at lærlingur ein part av lærutíðini kann arbeiða á einum øðrum læruplássi afturat høvuðslæruplássinum. Sum dømi kann nevnast, at ein lærlingur, sum er í læru á smoltstøð, kann arbeiða eini 80% av tíðini á smoltstøð, meðan hann kann arbeiða hini 20% á alibrúki á sjónum.

Ognarviðurskiftini í alivinnuni eru soleiðis, at fleiri alistøðir og smoltstøðir hava sama eigara ella eiga partar av feløgum, sum reka aðrar smolt- og alistøðir.

At ognarviðurskiftini eru soleiðis háttaði í alivinnuni ger, at arbeiðsbólkurin metir, at eingir praktiskir trupulleikar skuldu verið, sum forða fyri, at lærlingurin fær fjølbroytta læru.

**Hvat slag av virkjum talan er um**
Virkini, ið talan er um, eru flaka- og kryvjivirki, umframt smolt- og alistøðir.

**Tal av virkjum, sum verða mett at lúka treytirnar**
Út frá eini meting, sum arbeiðsbólkurin hevur gjørt, eru 24 fiskavirki (íroknað roykivirki og laksavirki) og 8 kryvjivirki, sum lúka treytirnar í punkt 2 og 3, umframt at liva upp til formligu krøvini.

Føroysku smolt- og alistøðirnar eru flestu stórar og mett verður, at flest allar kunnu taka lærlingar, um tær annars lúka formligu krøvini til at taka lærlingar (sí fylgiskjal). Í løtuni verður mett, at 17 smoltstøðir og 23 alistøðir kunnu taka lærlingar í læru.

**Tal á lærlingum**
Fyri at fáa eina hylling á tørvinum á lærlingum innan fiskaídnaðin og havbúnaðin og hvussu nógv virki, ið kundu hugsað sær at sett lærlingar, um møguleiki var fyri tí, gjørdi arbeiðsbólkurin eina tørvskanning í fiskaídnaðinum og alivinnuni. Spurnarbløð vóru send út og svørini eru útgreinað niðanfyri.

Fyri at fáa eitt greiðari yvirlit yvir tørvin, hevur arbeiðsbólkurin í spurnarbløðunum skilt í millum alistøðir, smoltstøðir, kryvjivirki og flakavirki.

Talva 1 vísir, hvussu nógv spurnarbløð vóru send út til vinnuna og hvussu nógv virki hava svarað spurnarblaðnum.

*Talva 1:*

| | Spurnabløð út | Spurnarbløð inn | Svar% |
|---|---|---|---|
| **Flakavirki** | 21* | 12 | 57 |
| **Kryvjivirki** | 7 | 5 | 71 |
| **Smoltstøðir** | 17 | 14 | 82 |
| **Alistøðir** | 19 | 8 | 42 |

*Fleiri av hesum eru sera smá virki, sum ikki síggja seg føran fyri at taka lærling. Einstøk virki eru kombinerað flaka- og kryvjivirki, og eru tey tikin við undir einum.

Talva 2 vísir, hvussu nógv av teimum virkjum, sum hava svarað spurnarblaðnum, ætla at seta lærling, um møguleiki verður fyri tí í framtíðini.

*Talva 2:*

| | Seta lærling | Seta ikki lærling | Tal á lærlingum um árið |
|---|---|---|---|
| **Flakavirki** | 11 | 1 | 17 |
| **Kryvjivirki** | 5 | - | 7 |
| **Smoltstøðir** | 13 | 1 | 10 |
| **Alistøðir** | 8 | - | 7 |

Talvan vísir, at tað bert er í einstøkum førum, at virkini vísa tankanum um at seta lærling frá sær. Hetta metir arbeiðsbólkurin verða eina ábending um, at vinnan sum heild er sera áhugað í at kunna seta lærlingar. Harumframt gevur hetta eina tilsipan um, hvussu nógv lærlingapláss vinnan heldur tørvur er á um árið.

Út frá talvu 2 sæst, at vinnan metir seg kunna taka umleið 40 lærlingar um árið. Hetta metir arbeiðsbólkurin er ein ábending um, at vinnan hevur ein upparbeiddan tørv á at seta lærlingar. Hesin tørvur vil minka nakað komandi árini og arbeiðsbólkurin er av tí fatan, at tað ikki fara at vera meira enn 20 lærlingar eitt miðalár.

Talva 3 vísir, hvussu nógv virki meta seg hava fólk, sum kunnu taka sær av upplæring av lærlingi á virkinum.

*Talva 3*

| | **Meta seg hava fólk, ið kunnu hava ábyrgd av lærlingi** | **Meta seg ikki at hava fólk, ið kunnu hava ábyrgd av lærlingi** |
|---|---|---|
| **Flakavirki** | 12 | - |
| **Kryvjivirki** | 5 | - |
| **Smoltstøðir** | 9 | 2 |
| **Alistøðir** | 7 | - |

Um samanborið verður við talvu 2 omanfyri, eru tað ikki allar fyritøkurnar, ið kunnu hugsa sær at seta lærling, sum meta seg hava starvsfólk at taka sær av lærlingunum og geva tað upplæring, sum er neyðug.

Fyri at fáa eina meting av málbólkinum fyri útbúgvingina, hevur arbeiðsbólkurin hugt eftir, hvussu nógv fólk arbeiða í fiskídnaðinum og alivinnuni í Føroyum. Í november 2000 vóru 767 fólk í arbeiði í alivinnuni og 2.383 í fiskaídnaðinum. Hetta er samlaða talið á starvsfólkum í vinnunum og ein ábending um, hvussu stórur málbólkurin fyri lærlingaútbúgvingini er.

# 5. Skipan av útbúgvingini

## 5.1 Býtið millum verkliga læru og skúlagongd

Útgangsstøðið hjá arbeiðsbólkinum er, at lærutíðin er 3 ár, og at lærlingarnir skulu hava møguleika at koma inn á víðari tøkniligar útbúgvingar aftaná lokna læru, á sama hátt sum lærlingar á øðrum fakøkjum.

Áðrenn læran byrjar, gera lærupláss og lærlingur lærusáttmála sínamillum um læruna. Fyrstu 3 mánaðirnar eru royndatíðarskeið fyri báðar partar. Annars er lærusáttmálin millum partarnar bindandi og bert í serligum førum ber til at verða loystur frá sáttmálanum, um partarnir annars eru samdir um hetta.

Arbeiðsbólkurin mælir til at skipanin verður endurskoðað, tá fyrstu trý árini eru farin, og vinnan og skúlaverkið hava gjørt royndir við skipanini.

Arbeiðsbólkurin hevur arbeitt við trimum ymiskum skipanum fyri lærlinga-útbúgvingar innan fiskaídnaðin og havbúnaðin. Fyri at finna fram til best egnaðu skipanina til føroysk viðurskifti og føroyska vinnu, hevur arbeiðsbólkurin biðið nevndirnar í Føroya Ráfiskakeyparafelag og Føroya Havbúnaðarfelag um at um-mæla hesi trý uppskotini.

Í alternativ 2 er útbúgvingin skipað við fleiri skiftum millum skúla og læru og 2 tey fyrstu skúlaskeiðini eru skipað í ½ árum, har lærlingarnir byrja lærugreinirnar fyrsta hálvárið, fara síðani í læru 1 ár og síðani skúla ½ ár. Hetta hevði merkt, at long tíð hevði gingið frá tí at lærlingarnir byrjaðu uppá lærugreinirnar, til próv-tøka er í lærugreinunum. Somuleiðis hevði meginparturin av skúlanum verið savnaður um seinasta árið av lærutíðini, og var hetta mett at vera óheppið.

Alternativ 3 vísir eina skipan, sum er meira lík øðrum lærlingaútbúgvingum, vit kenna, við fleiri styttri skúlaskeiðum og skiftum millum skúla og læru. Henda skipanin er kend frá øðrum yrkisútbúgvingum, men hon var ikki mett at verða egnað til hesar lærlingar, tí týdningurin av, at lærlingurin fær minst ein saman-hangandi árssýklus á smolt- og alistøðum, verður mettur at vera stórur.

Alternativ 1 er lýst niðanfyri og er tað alternativ, sum arbeiðsbólkurin og nevnd-irnar í vinnufeløgunum kunnu taka undir við.

*Talva 4.*



Fyrimunirnir við hesi skipan eru, at læruplássið og lærlingurin sjálvi finna hvønn annan. Hetta er ein fyrimunur, sæð frá tí sjónarmiði, at tað hevur víst seg at vera torført hjá fiskivinnuskúlunum í Norðurlondum at fáa næmingar. Harumframt fær lærlingurin roynt seg á læruplássinum, áðrenn hann byrjar í skúla og gjørt sær eina meting av, um hetta er tann leiðin, hann ynskir at fara. Meginparturin av skúlanum verður avgreiddur innan 40 samanhangandi vikur tíðliga í útbúgvingini, og tá lærlingurin hevur verið til próvtøku, fer hann aftur á virkið í upplæring. Lærlingurin hevur ástøðiliga barlast, tá hann kemur av skúlabonki í 40 vikur, sum gevur honum førleikar at byggja verkligu læruna á og sama førleika, sum tey, ið taka støðisárið innan fiskivinnu (SIF). Lærlingurin fær eisini ein árssýklus samanhangandi úti á læruplássinum og hevur hetta serliga stóran týdning fyri lærlingar á smolt- og alistøðum.

Útbúgvingin kann skipast innan verandi fiskivinnuútbúgving, og tá ber til at henda útbúgvingin verður samskipað við útbúgvingarætlanirnar á fiskivinnuøkinum annars. Hetta er eisini í tráð við ætlan landsstýrismansins í mentamálum, ið hevur eina nevnd sitandi, sum ger tilmæli um at skipa útbúgvingarnar innan fiskivinnuna í einum fiskivinnu- og havbúnaðardepli, har tænastur eisini verða veittar vinnuni, umframt skeiðvirksemi til vinnuna. Hetta er somuleiðis ein ódýrari loysn, enn um útbúgvingin verður skipað í eini nýggjari serstakari skúlaskipan, t.d. á aðrari miðnámsútbúgving.

Tað kann eisini verða nevnt, at tey, sum frammanundan hava lokið støðisárið innan fiskivinnu, kunnu gera lærusáttmála. Hjá teimum kann skúlagongdin í stóran mun styttast við hesum 40 vikunum.

Ein vansi, sum vinnufeløgini eisini hava viðmerkt við hesi skipan, er tó, at 40 vikur samanhangandi er nakað leingi hjá lærlinginum at verða burtur frá læruplássinum. Hetta er ikki vanligt í øðrum lærlingaútbúgvingum, har lærlingurin skiftir oftari millum lærupláss og skúla, til tess at tryggja, at lærlingurin framhaldandi byggir ástøði á verkliga vitan.

Arbeiðsbólkurin metir, at útbúgvingin kann skipast soleiðis, at lærlingar á flaka- og kryvjivirkjum fáa somu almennu ástøðiligu førleikarnar, sum lærlingar á smolt- og alistøðum. Hetta merkir, at almennu grundlærugreinirnar á C-stigi (føroyskt, enskt, støddfrøði, alis- og evnafrøði, lívfrøði og samfelagsfrøði) verða tær somu fyri allar lærlingarnar. Tá tað kemur til fakligu grundlærugreinirnar, eru tað somuleiðis partar av skúlagongdini, sum allir lærlingarnir kunnu taka í felag. Hetta er m.a. kunningartøkni og reinføri.

Mett verður, at lærlingar á smoltstøðum og alistøðum hava eina ávísa felagsmongd innan tann ástøðiliga partin av læruni, t.d. innan handfaring av smolti og smoltifisering. Somuleiðis hava lærlingar á alistøðum og kryvjivirkjum eina felagsmongd av ástøði tengt at fakinum innan tøku og hagreiðing av fiski, og lærlingar á kryvjivirkjum og fiskavirkjum innan handfaring av veiddum/tiknum fiski, tíð og hitaviðurskiftum o.s.fr. Hesi viðurskifti eiga eisini at vera havd í huga, tá neyvari verður útgreinað, hvat útbúgvingin skal innihalda.

Hildið verður eisini, at fólk, sum frammanundan eru í vinnu innan fiskaídnað og havbúnað, kunnu fáa stytting í lærutíðini. Treytin má tó vera, at hesi hava arbeitt rættuliga breitt, soleiðis at kravið um ein fjøltáttaða læru verður lokið. Hetta er nakað, ið yrkisnevndin fyri útbúgvingina má taka støðu til í hvørjum einstøkum føri.

# 6. Ymisk viðurskifti í sambandi við skúlagongdina

## 6.1 Broytingar í verandi lógum og kunngerðum innan yrkisútbúgvingar í Føroyum

Við støði í tilmælinum frá arbeiðsbólkinum um, at útbúgvingarnar skulu verða á Fiskivinnuskúlanum saman við øðrum fiskivinnuútbúgvingum, mugu broytingar gerast í lógini fyri Fiskivinnuskúlan, so hann lýkur treytirnar í lógini um ávikavist yrkisútbúgvingar og yrkisskúlar. Hetta ber m.a. í sær, at Fiskivinnuskúlin við tíðini verður skipaður sum sjálvsognarstovnur.

Hóskandi kundi verið at gjørt hesar broytingar í lógini saman við øðrum broytingum í sambandi við eina komandi umskipan av yrkisgymnasialu útbúgvingini á Fiskivinnuskúlanum, umframt at neyðugt verður at gera eina útbúgvingarkunngerð at galda fyri alla útbúgvingartíðina.

## 6.2 Skúlagongdin í Føroyum ella uttanlands

Arbeiðsbólkurin hevur ta fatan, at tað er sjálvsagt, at skúlagongdin verður skipað í Føroyum, m.a. tí at talan er um útbúgvingar, sum serliga eru lagaðar til føroysk viðurskifti. Semja er eisini um, at vit hava neyðugan førleika í Føroyum til at fara undir slíkar útbúgvingar, og tí hevði tað verið heilt burturvið at flutt skúlagongdina í annað land.

Um nýggja lærlingaskipanin kann verða góðkend í øðrum londum er ilt at siga, av tí at líknandi útbúgvingar ikki finnast har, men hildið verður, at í grannalondunum eru nærum ongi krøv til útbúgving fyri at kunna arbeiða innan fiskaídnaðin ella alivinnuna, og tí kunnu vit síggja burtur frá neyðugari góðkenning í hesum sambandi.

Hinvegin er semja í arbeiðsbólkinum um, at tað er avgerandi neyðugt, at nýggja útbúgvingarskipanin verður góðkend í øðrum londum, so lærlingar kunnu útbúgva seg víðari. Hetta verður tryggjað við, at at lagt verður upp til, at í skúlaskeiðnum skulu lærlingarnir hava 6 almennar grundlærugreinir á C-stigi, sum er nøktandi fyri, at lærlingurin kann sleppa inn á viðkomandi framhaldandi tekniskar útbúgvingar í hesum sambandi.

## 6.3 Kostnaður

Fíggjarligu avleiðingarnar av at seta nýggju lærlingaútbúgvingarnar á stovn valdast í stóran mun, hvussu stórt talið av lærlingum verður. Útreiðslurnar kunnu bólkast í tvey: **skúlaútreiðslur** og **lønarendurgjald**.

Um ein flokkur av lærlingum byrjar í skúla seinnu hálvu í 2002, liggja útreiðslurnar til undirvísing um 250 tús. kr. í tí fíggjarárinum. Í 2003 er 1 flokkur á skúlanum bæði fyrru og seinnu hálvu, eins og í 2004 og frameftir. Harafturat kemur seinna skúlaskeiðið (12 vikur) fyrstu ferð fyri á heysti í 2004. Gingið verður her út frá, at undirvíst verður á 2 breytum seinna skúlaskeiðið – á fiskaídnaðarbreytini og á alibreytini. Skúlaútreiðslurnar verða her leysliga mettar til einar 250 tús. kr.

Tá ið talan er um lønarendurgjald, er her sum dømi roknað við **20 lærlingum** í hvørjum flokki.

*Talva 5: samlaður kostnaður í tús. kr.*

| Fíggjarár | Skúlagongd | Lønarendurgjald | Samlað útreiðsla |
|---|---|---|---|
| **2002** | 250. | 484 | 734 |
| **2003** | 500 | 968 | 1.468 |
| **2004** | 750 | 1.377 | 2.127 |

Roknað verður síðan við einum lærlingaflokki í skipanini hvørt ár, soleiðis at árligu útreiðslurnar fyri landskassan tilsamans verða 2.127 tús. kr. sambært galdandi lønarendurgjaldi og um sáttmálar fyri hetta øki koma at liggja á sama støði, sum í handverksvinnuni. Viðmerkjast skal, at upphæddirnar til lønarendurgjald eru treytaðar av, at bæði skúlaskeiðini verða tikin í sáttmálatíðini. Hugsast kann, at lærlingur kann hava lokið støðisárið innan fiskivinnu, áðrenn hann skrivar lærusáttmála. Í slíkum førum kann upphæddin til lønarendurgjald lækkast samsvarandi. Ein minni tilgongd av lærlingum, enn dømið omanfyri vísir, kann merkja, at undirvísingin av lærlingum og SIF-næmingum verður samskipað, og verður skúlakostnaðurin í slíkum førum lægri.

**Undirvísingarhøli og undirvísingarútgerð** mugu til, um lærlingaútbúgvingar verða settar á stovn innan fiskaídnaðin og havbúnaðin.

Um undirvísingin skal fara fram á Fiskivinnuskúlanum og í ávísan mun kunna samskipast við aðra útbúgving har, soleiðis sum tilmælið leggur upp til, verður neyðugt hjá skúlanum at fáa betri húsarúmd.

Tað er ilt at meta ítøkiliga, um hvør útgerð skal til, men givið er, at tørvur er á teldum og forritum, sum vinnan vanliga brúkar sum leiðsluamboð, umframt starvsstovuútgerð av ymiskum slagi.

Arbeiðsbólkurin kundi hugsað sær, at skúlin mest møguliga samstarvar við vinnuna um at nýta útgerð, sum finst á fiskavirkjum og á alibrúkum, soleiðis at lærlingarnir fáa eitt breitt innlit í vinnulívið og tær ymsu arbeiðsgongdirnar, sum finnast har. Her verður hugsað um størri tól, sum vinnan dagliga brúkar, eitt nú flakamaskinur, fóðringsskipanir og tílíkt.

## 7. Niðurstøða arbeiðsbólksins

Arbeiðsbólkurin hevur í arbeiði sínum lagt dent á, at uppskotið um eina skipan av yrkisútbúgving innan fiskaídnaðin og alivinnuna í størst møguligan mun er í samsvari við ynskjunum hjá vinnuni, samstundis sum skipanin í størst møguligan mun eisini nøktar útbúgvingartørvin hjá lærlingunum bæði við atliti at vinnuførleika eftir lokna læru eins og til framhaldandi lestrarførleika.

Bólkurin er av teirri meting, at hann í hesum áliti hevur lýst tey viðurskifti, sum honum varð álagt í tilnevningarskrivinum. Haraftrat metir bólkurin at skipanin, soleiðis sum hon er lýst í hesum áliti, lýkur tey krøv, sum verða sett til eina yrkisútbúgvingarskipan.

*Tórshavn, 9. mars 2001*

________________________
*Marita Rasmussen, formaður*

________________________
*Jákup Andreasen*

________________________
*Bogi Jacobsen*

________________________
*Petur Oluf Hansen*

________________________
*Hans A. Dam Joensen*

Yvirlit yvir virki í føroyska fiskaídnaðinum:



Yvirlit yvir virki í føroysku alivinnuni:

